Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



## Jóan Pauli Joensen, rektari 60 ár

Leygardagin 30 apríl fyllir rektarin á Fróðskaparsetrinum Jóan Pauli Joensen, professari, dr.phil & fil.dr. 60 ár.

Jóan Pauli Joensen er útbúgvin fólkalívsfrøðingur frá Universitinum í Lund og Århus. Í 1975 fekk hann fil.dr heitið við Lunds Universitet fyri ritgerðina Færøske sluppfiskere og í 1987 dr.phil heitið við Århus Universitet fyri doktararitgerðina Fra bonde til fisker. Umframt hesar hevur Jóan Pauli skrivað hóp av bókum um ymisk siðsøgulig evni í Føroyum.

Seinasta bókin hjá honum er 'I ærlige Brudefolk. Bryllup på Færøerne', sum danska Museum Tusculanus forlagið gav út. Fyri bókina fekk Jóan Pauli Joensen virðisløn frá Kungl. Gustav Adolfs Akademin í Uppsala í Svøríki.

Jóan Pauli Joensen hevur verið rektari á Fróðskaparsetrinum síðani 1. desember 2004, frammanundan hevur hann verið rektari frá 1990 til 1998. Hann hevur verið í starvi á Fróðskaparsetrinum síðani 1989, sama árið varð hann tilnevndur professari í siðsøgu og fólkalívsfrøði.

Í 1998 og 1999 var hann professari í etnologi við Universitetið í Bergen. Frá 1976 til 1989 var hann savnsvørður á Føroya Fornminnissavni. Jóan Pauli Joensen hevur havt fleiri álitissessir í ymsum nevndum, bæði í Føroyum og uttanlands. Seinastu árini hevur hann verið formaður í Grundlógarnevndini.

Jóan Pauli Joensen er sonur Peter Ole og Irenu Joensen í Sørvági. Hann er giftur Louisu Lamhauge av Toftum, og eiga tey døturnar Duritu og Biritu.

Føðingardagin 30. apríl verður rektarin burturstaddur. Móttøka verður á Føroya Sjómansskúla týsdagin 3. mai kl. 15-17.



## 85 ára føðingardagur

Brynhild Hansen, Norðragøtu, verður 85 ár sunnudagin 1. mai.

Dagurin verður hildin í dagtilhaldinum í Gøtubrá frá kl. 15.00–19.00.

## Andlát

20. apríl
Marin Malena Joensen, kall Malla, fødd Klein, frá Gjógv, 89 ár.

21. apríl
Joen Pauli Feodor Hammer, Hvalba, 82 ár,

22. apríl
Anna Katrina Askham, Tórshavn, 104 ár.
Vilhelm Jacobsen úr Tjørnustovu í Norðragøtu, 89 ár.

23. apríl
Poulina Olsen, fødd isaksen, Klakvsík, 84 ár.
Merry Joensen, fødd Heinesen, ættað úr Klaksvík, 64 ár.
Jákup Pauli Georg Joensen, vanliga nevndur Palli Joensen, Hvalvík, 65 ár.

24. apríl
Olaf Krossteig, fyrrverandi lærari, ættaður úr Leirvík, búsitandi í Havn, 97 ár.
Jens Albinus, Fámjin, 84 ár.

27. apríl
Hans Sigurð Kragesten, vanliga nevndur Hasse, Tórshavn, 82 ár.

# Hilmar Thomsen farin

Leygardagin 23. apríl andaðist Hilmar Thomsen í Klaksvík 85 ára gamalur. Allir klaksvíkingar, sum eru komnir eitt lítið sindur upp í árini, minnast Hilmar, sum var politistur og harvið almennur persónur í Klaksvík.

Hilmar var føddur og uppvaksin í Sumba. Hann róði út og var við slupp, og fyrstu krígsárini sigldi hann niður við fiski. Á nýggjárinum í 1943 varð Hilmar fyribilssettur sum kommunalur politistur í Miðvági. Hetta var mitt undir krígnum, tá ið umstøðurnar vóru so serligar, eitt nú við at fleiri túsund bretar hildu til í Vágum.

1. desember í 1944 varð Hilmar settur kommunalur politistur í Klaksvík. Sambært bókini hjá Hjartvardi Skálagarð um politiið í Føroyum, so var Hilmar fjórði politisturin í Klaksvík. Petur Juul Samuelsen, Bernhard Brim og Jaspur Leivsgarð vóru og høvdu verið frammanundan honum.

Síðst í fýrati árunum var Hilmar í knappliga eitt hálvt ár á skúla í Danmark. Hilmar fann sær konu í Klaksvík, og harvið gjørdist hann ein av mongu klaksvíkingunum, sum miðskeiðis í síðstu øld vóru komnir aðra staðni frá í landinum.

Klakvíkingar minnast Hilmar sum dámligan og fryntligan mann. Hann fór úr politistastarvinum vegna aldur 1. september í 1982, men hann helt fram at arbeiða eitt sindur sum politistur inntil 1. september í 1985, tá ið hann varð endaliga loystur úr starvi. Tá var Hilmar framvegis væl fyri, og nógvu tey næstu árini arbeiddi hann á Norðborg og helt vakt umborð á skipum.

Hilmar giftist í 1959 við Jytte Havn Rasmussen úr Klaksvík. Tey fingu tvey børn - Karl Johan, sum býr í Klaksvík, og Onnu, sum býr í Kolding.



*Jaspur Leivsgarð og Hilmar Thomsen (hm.) á trappuni við elstu politistøðina í sunnara enda á Havnarskrivstovuni*

- 20 ár -



Í sambandi við at 20 ár eru liðin síðani
Bústovnurin á Sólteigi byrjaði virksemi
sítt, eru øll fyrrverandi búfólk vælkomin
inn á gólvið mánadagin 2. mai
frá kl. 15.00 til kl. 18.00

Sosialurin 341800

## Dagurin

**30. apríl. Dagurin eitur Severus**. Var í fimtu øld biskupur í Napoli.

**Mai mánaður**
Nevndur eftir *rómversku gudinnuni Maju*, sum var gudinna fyri gróðri og grøði. Summir halda, at navnið kemur av latínska orðinum *majores, teir gomlu*, ið var navnið á gamla senatinum í Róm.

**1. mai. Dagurin eitur Valborgarmessa**. Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Valborgarnátt varð hildin mikil várveitsla í Norðurlondum, og tað er ta náttina, at trøllkonur ríða at Bloksbjørgum.

Germanskt navn, ið merkir *vald* og *vernd*.

1. mai er *arbeiðaradagurin*, sum varð hildin á fyrsta sinni í París í 1889.

**2. mai. Dagurin eitur Atanasius**, deyður í 373. Patriarkur í Aleksandria. Var kendur kirkjulærari, og hevur sett saman eina trúarjáttan, sum varð samtykt í Nikæa í 323, og sum ber navn hansara.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 85 ára føðingardegnum, takki eg hjartaliga.

**Heilsan**
**Andrea Magnussen, Søldarfjørður**